# FINALUR OG SPEAKARI





*Miroslav Klose javnar fyri Týskland í fjórðingsfinaluni í 2006, sum týskarar vunnu eftir brotssparkskapping.*





**KLOSE JAVNAR**



**RUMBUL OG ROK**

*Fjórðingsfinalan millum liðini í 2006 gjørdist rættuliga heit, og endaði í einum stórum rokið. Legg til merkis Maxi Rodriguez við nevanum hægst, klárur at langa Bastian Schweinsteiger í nakkan.*



*Týskarar við steypinum í 1990*

um hita. José Brown legði Argentina á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki økti Jorge Valdano til 2-0, og tað sá út til at Argentina fór at koyra sigurin heim, men so endurtóku týskarnir ta sertýsku dygdina. Teir komu afturíaftur. Tá 74 minuttir vóru farnir minkaði Karl-Heinz Rummenigge til 1-2, og bara seks minuttir seinni javnaði Rudi Vøller til 2-2. Nú sóu mong longda leiktíð fyri sær. Men stutt undan leikloki spældi Diego Maradona Jorge Burruchaga leysan, sum beindi bóltin í málið til 3-2 til Argentina. 30 miljónir fólk hátíðarhildu sigurin í gøtunum kring alt Argentina, og fagnaðurin mundi ongan enda fingið. Diego Maradona vann tann gylta bóltin, fyri at verða tann besta spælarin í HM-endaspælinum. Nógvir onglendingar hildu lítið um hetta, tí hann brúkti hondina, tá hann skoraði ímóti Onglandi í fjórðingsfinaluni. Men í sama dysti skoraði Maradona kanska vakrasta málið í HM-søguni, tá hann koyrdi slalom við bóltinum gjøgnum alla ta ensku verjuna.

## HM-finalan í 1990

Liðini møttust aftur í HM-finaluni á tí olympiska leikvøllinum í Róm tann 8. juli í 1990. HM-endaspælið í Italia hetta árið verður mett at verða ringasta HM-endaspælið í søguni av mongum. Tí var tað kanska ikki so løgið, at finalan bleiv ein staðfesting av hesum. Argentinar vóru als ikki líka undirhaldandi, sum árini frammanundan, og var tað ikki leikliga uppiborið, at teir komu í finaluna. Í 1/8 finaluni ímóti Brasil vóru teir ófatuliga heppnir, tá Brasil skeyt stengur og yvirleggjarar sundur, meðan Argentina bert hevði ein málmøguleika, har Maradona við einari genialari sending spældi Claudio Cannigia leysan ímóti dystarenda. Cannigia vildi floyta á spælbýtið og á rættvísið, og sendi bóltin kyniskt í netið til 1-0. Í bæði fjórðingsfinaluni og í hálvfinaluni bjargaði argentinski málverjin, Sergio Goycochea sínum liði í brotsparkskappingum ímóti ávikavist Jugoslavia og Italia. Týskland, sum spældi sítt seinasta endaspæl, sum »Vestur-Týskland« stóð fyri ein stórum parti av tí hendinga undirhaldi, sum var í HM-endaspælinum hetta árið. Vert er bert at draga tvær hendingar fram frá sjálvari finaluni. Tá 65 minuttir vóru farnir fekk Pedro Monzon hjá Argentina tað reyða kortið fyri at fella Jurgen Klinsmann, og gjørdist Monzon fyrsti spælarin í søguni, sum bleiv útvístur í einari HM-finalu. 20 minuttir seinni feldi Roberto Sensini Rudi Vøller í argentinska brotsteiginum. Andreas Brehme var settur at skjóta brotssparkið, sum Týskland fekk burturúr støðuni. Andreas Brehme var tryggur, og hann sendi alt Týskland í ekstasu. Ikki so langa tíð aftaná HM-finaluna vóru Vestur- og Eystur-Týskland sameind aftur.

## Stadionspeakarin í 2006

Liðini møttust eisini í HM-fjórðingsfinaluni í tí seinasta HM-endaspælinum, sum var í Týsklandi í 2006. Roberto Ayala legði Argentina á odda tá fýra minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, og leingi var líkt til, at Argentina fór at senda vertstjóðina út í myrkrið. Men 10 minuttir áðrenn leiklok javnaði Miroslav Klose – hvør annar? – fyri Týskland, og bjargaði týskarum longda leiktíð. Í longdu leiktíðini kom einki mál. Í brotssparkskappingini settu týskarar fýra av fýra brotsspørkum í netið – sum ikki einaferð! – meðan Argentina brendi tvey av fýra brotsspørkum. Rættiliga nógv rok var aftaná dystin, men tað sum er kanska mest minniligt er nakað, sum hendi framvið vøllinum. Tá tað sá myrkast út hjá Týsklandi, og Argentina førdi 1-0 ljóðaði úr hátalarunum frá stadionspeakaranum – ella vallarvarparanum, sum tað eitur á føroyskum: *»Mínar damur og mínir harrar, okkara lið hevur tørv á tykkara stuðuli«*. FIFA handlaði skjótt, og fekk stadionspeakaran sekkjaðan, tað sum eftir var av HM-endaspælinum. Høvuðsorsøkin hjá FIFA var, at tað var ímóti Fair Play andanum at hjálpa heimaliðnum gjøgnum hátalarakervið. Ein suðurafrikani er stadionspeakari, tá liðini hittast í Cape Town, og vit fáa vónandi og væntandi eina spennandi og minniliga fjórðingsfinalu.

heris@sosialurin.fo